KÍ var í tungum sjógvi

Løgmanssteypið: *Undirlagið í Klaksvík er ein skandala, sum ber í sær, at tað ikki ber til at spæla fótbólt, tá tað regnar*

Klaksvíkingar høvdu hósdagin fyrsta høvið í ár at síggja týdningarmiklan fótbóltsdyst. Hýrurin var góður, tí meistararnir og steypavinnararnir vunnu sannførandi stórsigur móti tunnum sumbingum. Men KÍ hevði ikki høvi at vísa áskoðarunum samanhangandi fótbóltsspæl.

At siga, at spælið ikki var flótandi, hevði ikki verið rætt, men skal tað vera rætt, so skal orðið flótandi skiljast bókstaviliga. Vøllurin stóð undir í vatni, sum hann gjørdi, tá meistaraskapurin kom til høldar móti ÍF síðsta heyst.

Ikki tí, viðhaldsfólkini hjá KÍ høvdu gjørt sítt. Tá tað seinnapartin mikudagin framvegis var nógvur kavi á vøllinum, fóru tey at grava við spaka. Arbeiðið var liðugt hósnáttina klokkan tvey, men so var tað, at regnið fór at oysa niður, og fótbóltsspælararnir úr Sumba og KÍ vassaðu á vøllinum í 90 minuttir.

KÍ hevur nógvar góðar spælarar, sum trívast væl í skjótum samanspæli á jørðini. Tí er einki at ivast í, at tað var teimum til størri ampa, at líkindini ikki vóru betri, enn tey vóru.

Rógvi í støtinum

Klaksvíkingar staðfestu beinanvegin, at teir ætlaðu ikki sumbingum nakað stigið. Rógvi Jacobsen, sum hesa ferð var í álopinum, hevði skorað tvey mál, tá fimm minuttir vóru farnir. Sumbingar fingu góðar fyritreytir at koma afturíaftur, tá ein lítil hálvur tími var farin, men tað eydnaðist ikki. Ove Nysted varð rikin av vøllinum, tá hann við hondini steðgaði bóltinum, sum var á veg í málið eftir royndi frá Spasojé Biberdzic.

Dómarin dømdi brotsspark, men Gunnar á Steig bjargaði meistarliga royndini úr ellivu metrum frá René Thomsen

Heðin á Lakjuni, sum í fýra teimum fyrstu dystunum hevði skorað helvtina av málunum hjá KÍ í steypakappingini, økti til 3–0, og so var Rógvi Jacobsen aftur á blettinum. Hann skoraði tvær ferðir og serliga fjórða málið var eitt fínt langskot.

Klaksvíkingar settu unglingarnar Hjalgrím Elttør og Símun Joensen á vøllin í 2. hálvleiki. Enn hevur tað ikki eydnast Hjalgrími Elttør, sum plagar at skjóta nógv mál í yngru deildunum, at skora í 1. deild. Hesa ferð fekk hann møguleikan, tá KÍ fekk brotsspark, men Eigil Olsen í Sumba málinum bjargaði royndini úr ellivu metrum.

Fólkatrot

Sumbingar eru skerdir, tí fleiri teirra, sum hava verið fastir á liðnum seinnu árini, eru burturfrá. Her verður m.a. hugsað um Eirik Joensen og Páll Magnar Kjærbæk, sum eru skaddir, og Jan Poulsen og Dánial J. Joensen, sum hava verið burturstaddir.

Jugoslavin Nebosja Velkovic er illa skaddur í knænum. Hann er farin til hús at fáa skurðviðgerð, og teir vóna, at hann kemur aftur í summarsteðginum.

Ein nýggjur jugoslavi kom til Sumbiar langa fríggjadag. Hann eitur Sasha Tomagek. Hann er miðvallari og álopsmaður, og teir vóna, at hann verður við í fyrsta landskappingardystinum, sum verður 2. páskadag, tá vóna teir, at Eirikur Joensen eisini verður tøkur.

Í Klaksvík komu ungu og lítið royndu menninir Heini Vestergaard og Sólfinn Kjærbo inn í 2. hálvleiki.

JH

KÍ–Sumba 5–0 (2–0)
1–0: Rógvi Jacobsen 4.
2–0: Rógvi Jacobsen 5.
3–0: Heðin á Lakjuni 49.
4–0: Rógvi Jacobsen 75.
5–0: Rógvi Jacobsen 78.
Reytt kort: Ove Nysted, KÍ, 29.

Dómari: Niklas á Líðarenda

KÍ:
Gunnar á Steig – Harley Bertholdsen, Jan Andreasen, Andrzej Pacek, John Ryan – Arnold Joensen, Marek Vierzbicki, Jan Joensen – Rógvi Jacobsen, Ove Nysted, Heðin á Lakjuni

Sumba:
Eigil Olsen – Mortan úr Hørg, Trygvi Nielsen, Marlon Kjærbo, Spasojé Biberdzic, Jón Lisberg – Hallur Dam Joensen, Nicola Biberdzic, Hans Jákup Thomsen – René Thomsen, Birgir Jørgensen

GÍ liggja væl fyri

Í einum dysti, sum heldur verður mintur av ófantaligum spæli enn vøkrum fótbólti, eydnaðist tað GÍ at vinna ein tryggan 3-0 sigur á HB, og nú liggja gøtumenn væl fyri í dystinum um at vinna fremsta plássið í bólkinum

Jákup Mørk

HB-GÍ 0-3 (0-1)

Undan dystinum varð tað av mongum roknað við, at hetta mundi verða dysturin, har avgerðin um fyrsta plássið í bókinum skuldi fella. Eitt fyrstapláss, sum kann hava avgerandi týðning, tí tveyarin í bólkinum eftir øllum at døma skal hitta KÍ í fjórðingsfinaluni í steypakappingini.

Linligt

Tølini siga, at GÍ gjørdist vinnari av dystinum, og samanumtikið var hetta kanska heldur ikki heilt av leið. Dysturin byrjaði annars við varligum spæli frá báðum pørtum, men tá fyrri hálvleikur var á leið hálvrunnin, eydnaðist tað GÍ at leggja seg á odda, tá Súni Olsen bráðliga fekk ríkiligt av plássið innanvert vinstru síðu av brotsteiginum.

Málið var á sín hátt eisini rættuliga sigandi fyri gongdina í fyrra hálvleiki, tí tað tóktist eins og eingin HB leikari visti, hvør átti ábyrgdina av gøtumanninum, soleiðis at allir bert bíðaðu, til okkurt fór at henda.

Júst hesin væntandi máttur at seta seg ígjøgnum, eyðkendi eisini restina av fyrra hálvleiki. HB hevði bóltin stóran part av tíðini, men spælið gekk alt ov seint fyri seg, og GÍ leikararnir fingu alla tíðina stundir til at skipa seg í verjupartinum.

Rúni Nolsøe var helst einasti leikari, sum royndi at fáa nakað av ferð á miðvøllinum, men ein leikari fær ikki stýrt dystinum einsamallur. Ferðin á spælinum hjá HB var snøgt sagt alt ov lág, tí leikarar alla tíðina skuldu nerta bóltin í minsta lagi einar tværtríggjar ferðir, og tí gjørdist støðan ongantíð serliga hættislig. Undantakið var tó, tá Hans á Lag bráðliga fekk risastóran møguleika eftir hornaspark, men verjuleikari hjá GÍ stóð á røttum stað, og fekk tískil vart fyri.

Var lítil ferð á HB spælinum fyrra umfarið, so var hon enn minni seinastu trý korterini. Undirmannaði miðvøllurin hevði alstórar trupulleikar av at fáa fatur á nøkrum. Tað tykist eisini løgið, at Símun og Ingi skulu spæla úti í borðunum, tí báðir hava teir sínar avgjørdu styrkir mitt á miðjuni, og ikki sum kantspælarar, har tað nærum er eitt krav, at tú skalt duga at draga framvið mótstøðuleikarum.

GÍ liðið fekk alsamt størri yvirvág í dystinum, og tá eitt korter var eftir, fall avgerðin í dystinum. Hetta hendi eftir hornaspark, sum Bárður Johannesen ikki fekk boksað nóg væl burtur. Bólturin fall ístaðin til Rúna Justinussen, sum royndi seg við skotið, og á fimm metra markinum var rumenski verjuleikarin hjá HB óheppin og beindi bóltin í málið.

Eftir hetta var tað bert ein spurningur um at fáa tíðina at ganga, og í seinasta minuttinum staðfesti Heini Heinason sigurin, tá hann (rangstaddur) varð spældur leysur av Magna Jarnskor.

Ov lin revsing

Eitt, sum sermerkti dystin, var at dómarin lat alt ov nógv av ófantaligum og til tíðir ljótum spæli fara framvið, uttan at viðkomandi leikarar vórðu revsaðir fyri gerðir sínar.

Fleiri dømi vórðu um hetta, men ógvusligasta var tó, tá Hans Pauli Olsen við fullari ferð rann beint í krovið á Rúna Nolsøe, hóast hesin hevði spælt bóltin eini tvey sekund framman undan. Hetta hendi beint eftir, at Rúni og Magni høvdu verið í hornatøkum. Sjálvt gøtumenninir kring vøllin vóru samdir um, at talan skuldi verið um reyða kortið, men Hans Pauli slapp bíligt, við bert at fáa gula kortið.

Í seinna hálvleiki íkomu fleiri líknandi støður, men einasta revsingin fyri hetta var, tá Bárður Mortansson fekk gult kort fyri at hevna seg, eftir at hava verið í hornatøkum við verjuleikara hjá GÍ.

Dómarar skulu tó eins og leikarar hava stundir til at koma í røttu venjingina, so vónandi sleppa vit undan at síggja ov nógvar illgerðir í ár, sum ikki viðføra røttu revsingina.

HB-GÍ 0-3 (0-1)
0-1 Súni Olsen
0-2 Sjálvmál
0-3 Heini Heinason

Dómari: Súni Johansen

HB:
Bárður Johannesen - Janus Joensen, Florin Mihaescu, Hans á Lag, Jóhannis Joensen - Símun Eliasen, Rúni Nolsøe, Giurea Gheorghe, Ingi Rasmussen - Bárður Mortansson, Jón Rói Jacobsen

GÍ:
Sunnvard Joensen - Hans Pauli Petersen, Áslakur Petersen, Bartal Eliasen, Leivur Hansen - Súni Olsen, Pauli Jarnskor, Jóan Petur Olsen, Magni Jarnskor, Rúni Justinussen - Helgi L. Petersen

Á myndini er Hans Pauli fyrri enn Hallur á bóltinum, og yvirhøvur var hetta eisini støðan í dystinum, tí gøtumenninir vóru so at siga alla tíðina skjótari á bóltinum enn havnarmenninir

Mynd: Álvur Haraldsen

B68 framvegis ósigrað

Løgmanssteypið: *Men hesa ferð stóðu fuglfirðingar seg betri á útivølli, enn teir gjørdu í Gundadali móti B36*

Toftamenn hava gott fólk við nógvum royndum. Setningurin hjá teimum verður at royna at blanda seg í kappingina um heiðursmerkini. Fuglfirðingar hava fleiri evnaríkar og ungar spælarar, og teir hava eisini onkrar, sum hava royndir. Teirra setningur verður at royna at blanda seg í kappingina um plássini, sum bera uppflyting til bestu deildina við sær.

At tað var munur á støðinum, sum liðini skulu kappast á, sást á Svangaskarði. Teir á heimaliðnum vóru tryggari á bóltinum, teir gjørdu færri mistøk, og teir megnaðu betri at samanspæla við fyrstu ferð sendingum, enn teir í ÍF gjørdu tað.

B68 vann tryggan sigur. Tey trý stigini høvdu við sær, at fyrsta plássið í bólkaspælinum varð staðfest, og tað staðfesti eisini, at toftamenn høvdu fult stigatal eftir fimm steypadystir.

Umstøðurnar vóru torførar í 1. hálvleiki, men tað var tá, at tað eydnaðist best hjá B68. Øssur Hansen setti hol á eftir stutt horna úr høgru. Úr spískum sendi hann dygst inn við handara stólpanum. Hetta var í 16. minutti, og átta minuttir seinni økti landsliðsmaðurin, sum hevði rættuliga leysan leiklut á miðvøllinum. Seinnu ferðina, sum Øssur skoraði, varð hann spældur leysur av einum øðrum av landsliðsmonnunum hjá B68. Fróði Benjaminsen lyfti hegnisliga inn um verjuna.

Fróði Benjaminsen økti til 3–0 í 35. minutti. Tað gjørdi hann, eftir at Eyðstein Skipanes hevði lagt horna innfyri úr vinstru.

Bárður við aftur

Tað lá kanska í luftini, at ÍF, sum í 1. hálvleiki hevði misnýtt ein stóran møguleika eftir kiksaða B68 afturlegging, enn eina ferð skuldi tapa stórt á útivølli. Vánirnar versnaðu hjá ÍF, tá teir í steðginum vóru noyddir at taka skadda Rúna Petersen út. Toftamenn vóru framrættaðir, men tað eydnaðist teimum ikki at fáa mál.

Ístaðin skoraði Bárður á Lakjuni fyri ÍF. Vandamiklasti bóltspælarin hjá ÍF hevur verið skaddur, og tískil hevur hann ikki vant so nógv síðstu tíðina. Bárður kom á vøllin beinanvegin eftir steðgin, og átta minuttir seinni hevði hann skorað. Viggo Johannesen, sum var miðvallari, stakk bóltin fram ímillum, og Bárður gjørdi sær dælt av, at verjuparturin var tunnur.

Hjá B68 spældi Jan Petersen ikki við, tí hann var skaddur. Jan Dam spældi bara 1. hálvleik, so fór hann út, tí hann kendi sær ein løst. Tá hann fór út, kom unglingaspælarin Kristian Poulsen á vøllin, og tá fór Jákup Eli Olsen í miðverjuna.

JH

B68–ÍF 3–1 (3–0)
1–0: Øssur Hansen 16.
2–0: Øssur Hansen 24.
3–0: Fróði Benjaminsen 35.
3–1: Bárður á Lakjuni 53.

Dómari: Lassin Isaksen

B68:
Magnus Poulsen – Mannbjørn Nesá, Jan Dam, Arnbjørn Danielsen, Jákup Eli Olsen – Øssur Hansen, Fróði Benjaminsen, Marlon Jorge, Eyðstin Skipanes – Marcello Marcellino, Súni Fríði Johannesen

ÍF:
Allan G. Joensen – Sigfríður Abrahamsen, Torstein Joensen, Alvi Justinussen, Tomek Przybilski – Hjalti Lundsbjerg, Viggo Johannesen, Mortan Thomsen, Høgni Zachariasen, Ken Bærendsen – Rúni Petersen

Í evstu løtu

Løgmanssteypið: B36 fekk væntaða sigurin suðuri á Sandi, men tað var ikki fyrr enn klokkan var farin væl av teimum 90 minuttunum, at sigurin kom undir land

Jákup Mørk

B71-B36 0-1 (0-0)

Einki var at ivast í, at B36 var at rokna sum favorittar, tá teir skírsimorgun løgdu leiðina suður til Sands, har útidystur móti B71 stóð á skránni.

B71 var greitt við undirlutan, tá liðini hittust í Havn, og harumframt hevði B71 eisini tapt greitt fyri triðja fyrstudeildarliðnum í bólkinum, B68.

Nógvur vindur

Talan gjørdist tó als ikki um nakran stórsigur, og eftir dystin vóru sandoyingar sera harmir um, at tað ikki eydnaðist teimum at fáa í hvussu so er annað stigið.

Meginpartin av dystinum leikaði nevnliga sera javnt á. Nógvur vindur var, og serliga í fyrra hálvleiki órógvaði hetta spælið, tí bólturin somikið ofta varð blástur av vøllinum. Av Sandi frættist, at um talan var landskappingardyst, varð hesin neyvan settur í gongd, so ring sum líkindini vóru.

Eitt annað, sum eisini órógvaði spælið hjá havnarmonnunum, var, at John Petersen noyddir av vøllinum eftir einar fimm minuttir, tá hann í hendiligum samanbresti fekk ein snudd í knæðið.

Talan gjørdist ongantíð um nakað serliga flótandi fótbóltsspæl fyrstu trý korterini, men bæði liðini høvdu tó einstakar møguleikar, sum tey tó ikki kundu gera sær dælt av. M.a. høvdu B71 ein stútara, sum tók í tvørstongina, og í hinum endanum varð Carl Høgnesen, sum kom á vøllin fyri John Petersen, púra leysur við málverjanum.

Langur seinni hálvleikur

Í seinna hálvleiki linkaði hann vindin nakað, og hetta betraði sjálvandi eisini um umstøðurnar at spæla. Dysturin var tó framvegis javnur, og bæði liðini høvdu helst eisini roknað við, at talan fór at gerast um javnleik, tá klokkan var farin væl av teimum 90 minuttunum.

B36 megnaði tó at skora avgerandi málið, tá Bjarni Prior fekk sett høvdið undir eitt frísparksinnlegg av miðjum vølli, og frøin var sjálvsagt stór á B36 leikarunum, nú teir høvdu tryggjað sær stigini.

Dysturin var tó ikki lokin enn. Av Sandi frættist, at seinni hálvleikur vardi heilar 53 minuttir, men B36 megnaði so at varveita leiðsluna teir fimm minuttirnar, sum enn vóru eftir tá málið varð skotið, og so vóru stigini fingin til høldar.

Vónbrotnir

Sandoyingar vóru sum vera man vónbrotnir um tapið. Í 93 minuttir hildu teir favorittunum frá fatinum, og harumframt vildu fleiri eisini vera við, at B71 átti brotsspark miðskeiðis í seinna hálvleiki, tá teir mettu, at Kári Sørensen varð togaður niður í brotsteiginum.

At VB so eisini megnaði at vinna inni í Runavíkini, gjørdi bara støðuna enn verri, tí við VB sigri í Runavík, og einum stigi til B71 móti B36, hevði ein sigur á fuglfirðingum leygardagin helst verið nóg mikið hjá B71 til at tryggja sær víðari luttøku í kappingini. Nú er støðan eftir øllum at døma soleiðis, at B71 í besta føri verður vánaligasti trýarin í teimum trimum bólkunum, og sostatt noyðist at siga farvæl til løgmanssteypið á hesum sinni.

B71-B36 0-1 (0-0)
0-1 Bjarni Prior 90

B71:
Waldemar Nowicki - Bernhard Petersen, Jón Brekku, Bergleif Sólsker - Jógvan Jón Petersen, Eli Hentze, Kári Nielsen, Rúni í Soylu, Kristian Nielsen - Julian Thomsen, Høgni Hansen
B36:
Pól Næs Joensen - Herbert í Lon Jacobsen, Egil Zachariasen, Fróði Clementsen - Magni á Lakjuni, Jens Kristian Hansen, Jan Guttesen, Bjarni Prior - Jákup á Borg, Ronnie Samuelsen, John Petersen

Dómari: Jens Petur Brattaberg

Vágbingar í hopla

Løgmanssteypið: VB hevði á útivølli gott tak á NSÍ, sum var merkt av máttloysi og einari rúgvu av mistøkum

VB vísti skírisdag í Runavík, at teir hava tilfar til eitt lið, sum tað ber væl til at ímynda sær kann røkka langt í landskappingini.

NSÍ hevði tveir stórar møguleikar beinanvegin, men Gert Langgaard og Mortan Hansen misnýttu, og eftir tað hevði NSÍ so at siga ongan upplagdan møguleika. Líkindini at spæla vóru serliga í 2. hálvleiki góð, men spælið hjá NSÍ var merkt av, at spælararnir gjørdu eina rúgvu av mistøkum. Sendingarnar og temjingarnar vóru alt ov ofta óneyvar, og tað eydnaðist so at siga ikki at koma ígjøgnum í borðunum.

Tá bóltarnir vóru sendir inn í brotsteigin, vóru brøðurnir Eyðun Kjærbo og Janus Kjærbo og tvíburðarnir Magni og Eyðun Jacobsen sannir knassar. Og tað, sum teir ikki tóku sær av, syrgdi væl spælandi Bjarni Johansen fyri.

Næst við at fáa mál í 2. hálvleiki var NSÍ, tá Eyðun Jacobsen royndi at senda eitt flatt innlegg úr høgru frá Kára Hansen burtur. Verjumaðurin rakti ikki væl á bóltin, sum akkurát skrúvaði uttanfyri samankomingina og út til horna.

Hugflogsfrikt

VB dúvaði nógv upp á snarálopini. Teir lótu heimaliðið koma langt fram á vøllin. VB, sum var væl betri í bærdystunum, gjørdi góða nyttu burtur ru mistøkunum hjá NSÍ. Við Milan Kuljic sum frágera væl uppløgdum stýrimanni eydnaðist tað bóltrtryggu monnunum ferð eftir ferð at spæla seg til møguleikar, men í 2. hálvleiki fingu teir einki burturúr.

Fyrra málið fingu teir í 27. minutti. Milan Kuljic sendi fríspark fimm metrar frá baklinjuni í høgru og dygst inn undir handara stólpan. Í hesum førinum átti NSÍ málverjin at havt bjargað.

Miðverjin Arnfinn Langgaard legði nógv fyri í royndini at bjarga, men hann rendi saman við stólpanum og endaði hjá lækna. Skaðin hevði við sær, at Trygvi Mortensen var noyddur at umskipa. Sjúrður Jacobsen varð fluttur inn í miðverjuna, Brynjolvur Nielsen fór aftur á vongverjan í vinstru, og Ian Højgaard, sum hevði verið burturstaddur, kom inn á miðvøllin.

Seinna VB málið kom í 36. minutti. NSÍ hevði horna, verjuparturin hjá teimum var tunnur, og so gjørdu vágbingar skjótt av. Rúni Joensen hálvbjargaði royndini frá Milan Kuljic, og Robert Cieslewicz, sum var ein støðug hóttan í álopinum, var fyrstur á returbóltinum.

Fram móti dystarenda skifti VB tríggjar menn inn. Umframt Marner Richard, sum ofta hevur spælt við, komu tveir óroyndir menn á vøllin: Oliver Abrahamsen, sum í fjør spældi fimm minuttir í landskappingini, og Kári í Lágabø, sum í síðsta minuttinum kom fyrstu ferð á besta liðið hjá VB.

NSÍ royndi at styrkja um álopspartin við at seta Sonna L. Petersen og Eddie Mikkelsen inn mitt í 2. hálvleiki, men tað gjørdi akkurát tað sama.

JH

NSÍ–VB 0–2 (0–2)
0–1: Milan Kuljic 27.
0–2: Robert Cieslewicz 36.

Dómari: Oddmar Andreasen

NSÍ:
Rúni Joensen – Kári Hansen, Dánial Hansen, Arnfinn Langgaard, Sjúrður Jacobsen – Gert Langgaard, Djóni N. Joensen, Brynjolvur Nielsen, Jónstein Petersen – Mortan Hansen, Christian Høgni Jacobsen

VB:
Bjarni Johansen – Janus Kjærbo, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen, Eyðun Kjærbo – Palli Augustinussen, Mikael í Lágabø, Milan Kuljic, Jón Pauli Olsen – Robert Cieslewicz, Krzysztof Popczynski